# Erik Arne Bjørk

* 27. juli 1918. † 18. mars 1972.



Erik Arne Bjørk var borin í heim í Keypmannahavn 27. juli 1918. Varð studentur frá Ø. Borgerdydskole 1937, tók løgfrøðiligt embætisprógv 1944. Sama ár verður hann sakførara-fulltrúi í Høng, og í 1946 dómara-fulltrúi í Sorø. Frá 1. apríl 1951 verður hann sorinskrivara-fulltrúi og frá 1. juli 1965 sorinskrivari í Tórshavn.

Tað hevur helst ikki verið heilt av tilvild, at hesin 28 ára gamli dómara-fulltrúin í Sorø søkir yrki í Føroyum. Man hava ligið eitt sindur av útfarahug í blóðinum. Bæði abbin og pápin vóru siglingarmenn. Og av tí at báðir høvdu verið í Føroyum — abbin kyndari og pápin maskinmeistari á danska herskipinum, sum hevði støð her um oyggjarnar — man hann eisini í barnaárunum hava hoyrt frásagnir um Føroyar og føroyingar, um viðurskiftini her.

Longu sama árið, hann kom higar, hevði hann gjørt vart við seg sum

granskari. Vit nevna grein hansara í Jyske samlinger, 1. bind, 3. hefti 1951: En trolddomsproces fra det 19'de århundrede.

Út yvir at røkja sítt fulltrúa- og sorinskrivarastarv í Føroyum, fór hann skjótt undir at kanna føroyskan landbúnaðarrætt. Hevur ivaleyst beinan vegin sætt, hvussu ólík viðurskiftini her vóru í mongum, samanborið við tað, hann kendi úr sínum egna landi, so hann hevur sætt seg neyðskaddan til at fáa meir at vita. Hetta hevur so, sum árini gingu, eggjað honum til at granska til botns alt, sum nam við landbúnaðarrætt í Føroyum.

Vetrarnar 1956—57 helt hann fyrilestrar um hesi evni í Tinganesi fyri innbodnum. Seinri læt hann handritini til fyrilestrarnar fjølrita saman við frásøgn um tað orðaskifti, sum eftir Bjørks ynski var aftan á hvønn fyrilestur. Hetta tilfar fylti trý heilt stór bind í støðd A-4, sum tey ið ynsktu tað, so fingu.

Hetta var eitt tiltak, sum gav Bjørk sorinskrivara miklan sóma í Føroyum, eitt verk so stórt, at vit mugu undrast. Í takksemi fyri hetta vitskapliga, grundleggjandi arbeiði, gav Føroya landsstýri honum heiðursgávu í 1960.

Sjálvur hevði Bjørk sett sær fyri, at fara undir aftur handritini til hesar fyrilestrar og útbúgva tey til prentingar. Men hóast hann hevði arbeitt nakað við hesari ætlan, eydnaðist tað honum ikki at fáa hetta liðugt, áðrenn hann so brádliga varð rivin burtur.

Hóast tað var honum ikki lagað at leggja síðstu hondina á arbeiðið við sínum meginverki, teimum fjølritaðu handritunum, sum meir enn nakað annað kundi gera hann kendan fyri sítt vísindaliga arbeiði, hevur hann tó avrikað fleiri týdningarmiklar ritgerðir um løgfrøðilig og onnur evni. Vit nevna:

Frt. (Fróðskaparrit) 8. bók 1959: Strandarrætturin í Føroyum. Hetta sama evni hevur hann eisini lýst í norska tíðarritinum Tidskrift for rettsvitenskap, árg. 1960: Strandretten på Færøerne. — Frt. 9. bók 1960: Heimrustir. — Frt. 10. bók 1961: Óðalsrætturin í Føroyum. — Frt. 12. bók 1963: Nevtollur og nýggjari føroysk lóggáva um oyðing av skaðafugli.

Í danska tíðarritinum, Fuldmægtigen 37. árg. 1965, nr. 3, 4 og 5: Om sorenskriverembedet på Færøerne og om sorenskriverfuldmægtigens arbejde. Hetta er ein nágreind frásøgn um tað ser-føroyska við hesum starvi, og evnið er rakt aftur í norsku og donsku tátíðina, eitt gott dømi um, hvussu fullfíggjað og grannlýst alt er, sum Bjørk leggur úr hondum.

Frt. 16. bók 1968: Oyðing av rottum og músum í Føroyum. Sama ár kemur grein í Úrval, 3. árg. nr. 1: Elsta søga Skopunar. — Frt. 18. bók 1970: Svinehold på Færøerne i ældre tid. — Úrval 3. árg. nr. 3: Brot úr søgu Lítlu Dímunar. — Í danska tíðarritinum, Jordens folk, 7. árg., nr. 1 1971: Jordfordeling og Ejendomsret.

Frt. 20. bók 1972. Her stendur Bjørks síðsta grein í hesum bókarrað, sum hann so trúliga hevði skrivað í: Børkuvísa (Potentilla erecta). Hetta

er eitt evni, sum ein skuldi hildið var høvundinum rætt fjart. Men tað tykist ongan mun at gera, hann viðger hesa urt út í æsir, alt um hennara heilsubøtandi evni, sum fólk trúðu hon hevði, og um brúkið av henni her í Føroyum at barka í. Alt er tikið við, og høvundurin endar hesa grein við einum lista, ið vísir á áttati heimildar-keldur, ið hann hevur kannað, áðrenn hann letur hesa ritgerð av hondini. So nógv krevur hann av sær sjálvum!

Um alt, ið E. A. Bjørk hevur greitt til prentingar, kann sigast, at ikki er bert at fara eftir heitinum á hvørjari greinini, tí alt, hann skrivar um, fær víðkaðan týdning, verður meir enn eitt innanoyggja fyibrigdi her heima hjá okkum, men verður sett inn í eina størri, søguliga heild, so tað fevnir víða út yvir okkara felags mentanarheim.

Tann 18. mars 1972 spurdist út um Føroyar, at E. A. Bjørk var deyður, rivin brádliga burtur í sínum 54. liviári. Tað kennist tómt, nú hann er farin, ein stórur saknur og missur fyri okkum øll. Tað stillfarandi, vinsæla menniskja, tann virkisfúsi embætismaðurin og granskarin er ikki meira. Men í minninum fer hann at liva millum okkara bestu menn.

*Heðin Brú.*